


# Statoil í stórum vøkstri uttan fyri Norra

**Jan Müller**

30.10.2013 - 20:20

Oljan.fo

Um somu tíð sum norska Statoil selur ognir og framleiðslupartar á norska landgrunninum, veksur framleiðslan munandi uttan fyri norskt mark. M.a. hetta kanst tú lesa úr úrslitinum hjá felagnum fyrstu níggju mánaðirnar í ár.

Rakstrarúrslitið hjá norska oljufelagnum Statoil triðja ársfjórðing í ár var 39,3 mia. kr. í mun til 40,4 sama tíðarskeið í fjør. Úrslitið higartil í ár er nakað verri enn somu tíð í fjør og kemst hetta m.a. av lægri prísi enn mett. Kortini er rakstrarúrslitið betri enn greinarar høvdu roknað við.

Framleiðslan á norska landgrunninum minkaði nakað, men samlaða framleiðslan vaks orsakað av stórum vøkstri í altjóða virkseminum. Statoil framleiddi 728.000 tunnur av olju um dagin, eitt met hjá felagnum uttan fyri Norra. Fýra tunnur av hvørjum 10 eru

framleidd uttan fyri Norra vísti Helge Lund, stjóri á, tá roknskapurin varð framlagdur. Hesar koma frá framleiðslu á landi í USA og til havs út fyri Brasil og Angola. Hann vísir eisini á góðu leitiúrslitini hjá felagnum seinasta árið, her bæði í norskum og altjóða øki, eitt nú út fyri Eysturafrika og út fyri Kanada.

“Fundið vit herfyri gjørdu út fyri Newfoundland er okkara størsta í ár og ein kann siga, at tað er okkara altjóða Johan Sverdrup,” sigur Lund.
Statoil ætlar at bora 60 brunnar í 2013 og fer at brúka 20 mia. kr. til hetta virksemið. Komandi árini verður eisini stórt leitivirksemi, har Statoil m.a. fer at bora ikki minni enn tveir brunnar á føroyska landgrunninum.

Statoil stendur eisini fyri nógvum stórum útbyggingum komandi árini teirra millum á Snorre feltinum, har byggjast skal ein nýggjur framleiðslupallur.

